## Halda eyga við oljuprísinum

Í Grønlandi hevur landsstýrið gjørt av at seta eina serliga nevnd, hvørs uppgáva verður at halda eyga við gongdini í oljuprísinum og kunna politikararnar og umsitingina um, hvørjar avleiðingar tann hækkandi oljuprísurin kann fáa á tann grønlendska búskapin. Eitt nú kann nevndin koma við uppskotum um tiltøk á einstøkum økjum, og tað kann t. d. hugsast, at hon fer at mæla til at framskunda ætlanir um vatnorkuútbygging, dýrkar oljan framvegis



## Oljuprísurin hóttir vinnuna

Hóast oljuprísurin er hækkaður munandi minni í Grønlandi enn aðrastaðni, kærir grønlendska fiski- og veiðimannafelagið seg longu um, at tann dýra oljan er ein álvarssom hóttan ímóti fiski- og veiðimonnum. John Bielmann, sum er stjóri í felagnum hjá fiski- og veiðimonnum, sigur við KNR, at fáa fiski- og veiðimenninir ikki rættiliga skjótt tilsvarandi meiri fyri tað, sum nteir veiða og avreiða, fer oljuprísurin at taka grundarlagið undan teimum.

# Tann nýggja, gamla kaffistovan



**Nýggju hølini hjá Kaffistovuni á keiini opna í morgin, fríggjadagin 4. juli.**

CAFÉ
*Bjørk K. Olsen*
*bjork@sosialurin.fo*

– Kaffistovan á keiini lat aftur 8. mars og hevur verið undir umvæling seinastu fýra mánaðarnar. Í morgin, fríggjadagin 4. juli, opnar hon aftur í nýggjum hølum.

– - Húsið er alt nýtt, men vit hava enn gamla konseptið hjá kaffistovuni, sigur Jóna Jacobsen, viðeigari og dagligi leiðari. Nýggjur køkur er komin, so betri møguleikar verða at bjóða viðskiftafólkum eitt meiri fjølbroytt útboð. Ætlanin er at hava morgunmat hvønn morgun og hava ein >>Tvey vesi eru bygd – eitt til konufólk og eitt til mannfólk. Ein eyka hurð er eisini sett í við einari rampu framman, so tað ber til hjá fólkum í koyristóli at sleppa inn í Kaffistovuna eisini. Opið verður hvønn gerandisdag frá klokkan sjey til klokkan fimm. Í vikuskiftinum er ætlanin at leiga hølið út til veitslur og annað. Pláss er fyri 70 fólkum á Kaffistovuni.

– - Vit byrja, har vit sleptu, og so fara vit at útbyggja konseptið harfrá, sigur Jóna Jacobsen.

# Tannáringar stjólu bil frá foreldrum




**Um trý-tíðina í nátt rendu ein 16 ára gamal og tveir 14 ára gamlir dreingir á bil á argjum við bilinum hjá foreldrunum at eina dreinginum**

LÓGARBROT
*Bjørk K. Olsen*
*bjork@sosialurin.fo*

Ein 16 ára gamal og tveir 14 ára gamlir dreingir tóku í nátt ein persónbil hjá foreldrunum at eina dreingingum og fóru á ferð. Ferðin varð tó ikki so áhugaverd, tá dreingirnir rendu á annan bil um trý tíðina í nátt. Bilarnir fóru sera illa, og teir fingu tískil ikki koyrt avstað aftur. Ein persónskaði var. Dreingirnir rýmdu, men løgreglan var skjót á staðnum og fangaði teir, áðrenn teir sluppu ov langt.

Av tí at bilførarin var undir revsingaraldrinum, vórðu dreingirnir koyrdir til hús, og málið verður nú yvirtikið av barnaverndini.

# Alt fleiri fara á heysin

**261 danskar fyritøkur fóru á heysin í juni. Hetta er ein øking upp á 28,6% í mun til juni i fjør**

KONKURS
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Nýggjastu hagtølini frá kredit- og analysufyritøkuni, Experian, vísir, at í juni mánaði øktist talið av konkursum við 28,6%, samanborið við sama mánað í fjør.

Í alt fóru 261 fyritøkur av knóranum í juni.

Økingin staðfestir tendensin seinastu mánaðirnar, har talið av konkursum hevur stabiliserað seg á einum støði, sum er hægri enn í fjør.

Verður hugt at seinastu 12 mánaðunum eru 2658 fyritøkur farnar á heysin, og tað er ein øking upp á 23,1%.

Bara fyrstu seks mánaðirnar í ár hava 1429 fyritøkur snarað lyklinum um, og við einfaldari framskriving ber til at síggja, at fleiri enn 2850 fyritøkur fara á heysin í 2008, skrivar politiken.dk




*Talið av donskum fyritøkum, sum fara av knóranum, er alsamt vaksandi*